# Mál- og avrikssáttmáli millum

# Blákrossheimið og Heilsumálaráðið

# 1. januar – 31. desember 2012

## 1. Missión og visión

### Missión
Vit eru viðgerðarstaðurin, ið tryggjar menniskjum, ið hava trupulleikar av rúsandi evnum, bestu viðgerð.

### Visión
At Blákrossheimið er fremsta og besta viðgerðartilboð í Føroyum fyri fólk við trupulleikum av rúsandi evnum, at Blákrossheimið er besta tilboðið, sum avvarðandi hjá fólki við trupulleikum av rúsandi evnum leita sær til, og vit vilja ganga á odda við hjálp til ung, og við upplýsing um ung og rúsandi evnir.

### Fyri at røkka visiónini, vilja vit á Blákrossheiminum:
-Seta fokus á at hava vælútbúgvin starvsfólk, ið umboða eitt tvørfakligt samstarv. Hetta inniber at starvsfólkini hava útbúgvingar innan lækna-, rúsevnisráðgevara-, sálar-, náms-, sosialráðgevara- og sjúkrarøktarfrøðina.

-Veita starvsfólkunum supervisión og tilboð um viðkomandi skeið, fyri at menna førleikarnar og fyri at viðurkenna viðlíkahald av teimum ymisku fakøkjunum.

-Arbeiða við at lýsa og greina viðgerðina, soleiðis at bæði starvsfólk, búfólk og fólk annars vita hvat vit gera og hvat vit standa fyri. Hetta er ein dynamisk tilgongd.

## 2. Inngangur

Blákrossheimið er stovnsett av og er ogn hjá Bláa Krossi Føroya, er stovnað í 1984, og verður rikið í samsvar við viðtøkurnar hjá Bláa Krossi Føroya.

At byrja við helt virksemið til í Kongagøtu 8 í Tórshavn, og pláss var fyri 5 fólkum. Heimið hevði tríggjar uppgávur: Bráfeingisviðgerð, Viðgerð og Herberg.

Skjótt sást, at ov lítið pláss var á heiminum, og at tað var trupult at fáa allar uppgávurnar loystar á sama staði. Í 1987 flutti virksemið í Lynggøtu 12.

Í 1991 fekk Blákrossheimið loyvi frá Føroya Landsstýri, sum staður fyri viðgerð av fólki við trupulleikum av rúsandi evnum, t.v.s. alment loyvi at arbeiða sum viðgerðarstaður. Blákrossheimið hevur síðani virkað sum bráfeingisviðgerðar- og viðgerðarstovnur burturav, fyri fólk við trupulleikum av rúsandi evnum.

Tað er pláss fyri 12 búfólkum, 3 í bráfeingisviðgerð og 9 í viðgerð í senn. Harumframt koma fólk í ambulanta viðgerð. Í miðal eru 14 fólk í viðgerð pr. dag. Tey, ið hava tørv á bráfeingisviðgerð, eru uml. 8-10 dagar á heiminum og kunna so halda áfram í viðgerðini. Sjálv viðgerðin er uml. 8 vikur ella meir, alt eftir hvussu støðan hjá tí einkulta er. Umframt tað bjóða vit upp til 2 ára eftirviðgerð.

### Áskoðan og arbeiði
Vit byggja á eitt kristið grundarlag. Hetta merkir m.a., at okkara áskoðan er, at øll menniskju eru skapt í Guds mynd, við einum ómetaligum virði sum frammanundan er lagt fast – leyst av gerðum og verkum ella

vantandi verkum og gerðum – leyst av likamligum og sálarligum sjúkum – leyst av brekum og moralskum mistøkum.

Við virðing fyri tí einstaka møta vit fólki har tey eru, hóast ymiskleikan. Vit vísa virðing hvør fyri øðrum. Vit eru viðurkennandi í okkara arbeiði, og vit meta at starvsfólk og viðskiftafólk hava sama menniskjaliga virði.

Fortreyt fyri einari góðari viðgerð er grundhugsanin, at broyting er møgulig. Vit arbeiða tí, millum annað, við motivatión um broyting, við sjálvsmetan, við lívssøgu, við hjálpandi netverki og relatiónum, og við handfaring av lívsførslu sum heild.

## Aðalendamálið hjá Blákrossheiminum

Blákrossheimið hevur til endamáls at virka sum viðgerðar- og avrúsingarstaður, familju- og ambulantur viðgerðastaður.

Okkara áskoðan á viðgerð er, at tað er ein menningargongd, har ein verður betri til at megna lív sítt og sína lívsførslu, uttan at skula doyva kenslurnar við rúsandi evnum. Vit leggja stóran dent á, at hvørt einstakt menniskja skal stjórna sínum egna lívi, hvønn einasta dag, fyri at skipa, savna og skapa gerandisdagin á ein slíkan hátt, at tey ymisku og ósamsvarandi krøv, ein kemur út fyri, kunnu sameinast og skipast.

## Endamálið

At viðskiftafólk okkara fáa eina virðiliga og góða viðgerð. Yvirskipað, er endamálið, at fáa eina realistiska mynd av veruleikanum, og samstundis fáa eyga á møguleikar fyri at gera neyðugar broytingar

Málið er:

- ✓ at ein fær innlit í egið lív, so at ein sær hvar neyðugt er at gera broytingar
- ✓ at ein verður tilvitaður um, hvussu tann negativa sjálvsmyndin og bundni er knýtt saman
- ✓ at ein lærir, at sárbæri er grundað á samspælið við umverðina, og hvussu ein fatar seg sjálvan
- ✓ at ein lærir at lívsførsla er tætt knýtt at, hvussu góðskan í lívi mínum verður frameftir

# 3. Fíggjar- og starvsfólkaviðurskifti

Fíggjarjáttanin til Blákrossheimið er góðar 5 mió kr. í 2012. Fíggjarætlan verður løgd við ársbyrjan, so játtanin heldur alt árið.

Við støði í fíggjar- og starvsfólkaorkuni hjá Blákrossheiminum, verður løgd ein ætlan fyri, hvat verður raðfest í árinum.

Blákrossheimið hevur 9,5 ársverk.

Blákrossheimið avgreiddi lønir umvegis Lønarskipan Landsins, fyrstu ferð í septembur í 2011, og er undir eini tilgongd at skráseta øll roknskaparskjøl umvegis Fíggjarskipan Landsins.

# 4. Kjarnuøki

## Blákrossheimið hevur hesi kjarnuøkir

- At veita bráfeingisviðgerð
- At veita viðgerð
- At veita eftirviðgerð
- At veita tilboð til avvarðandi

## Kjarnuøkið Bráfeingisviðgerð

Bráfeingisviðgerðin er eitt tilboð til menniskju, ið hava brúk fyri at fáa rúsdrekka/rúsevnini út úr kroppinum, og harvið verða avrúsaði. Bráfeingisviðgerðin er undir eftirliti av lækna og sjúkrarøktarfrøðingi. Bráfeingisviðgerðin varar alt eftir hvussu leingi ein hevur nýtt rúsdrekka/rúsevnir, og hvat slag av rúsandi evnum talan er um.

## Kjarnuøkið Viðgerð

Viðgerðin er býtt upp í dag- og døgnviðgerð, umframt Grundskeið og Framhaldsskeið.

### Dagviðgerð

Dagviðgerðin er eitt tilboð, grundað á samtalu við viðgerða, til menniskju ið eru vorðin bundin, og hava sosialt netverk og stuðul.

### Døgnviðgerð

Døgnviðgerðin er eitt tilboð til menniskju, ið eru  bundin og mangla sosialt netverk og stuðul, so at tey ikki klára seg við einari dagviðgerð.

### Grundskeið

Grundskeiðið er skipað yvir 4 vikur og inniheldur evnir og hugtøk, ið skulu brúkast í viðgerðini víðari. Grundskeiðið fevnir um klárlegging av búfólkunum og støðu teirra. Á grundskeiðinum verður arbeitt við at økja um motivatiónina og hækka sjálvsvirðið hjá tí einstaka, og ein verður styrktur í at taka ábyrgd og at gera broytingar.

### Framhaldsskeið

Viðgerðin er skipað yvir 4 vikur og inniheldur  sjálvsmeting, við atliti til seksualitet, parlag, sjálvsvirði/sjálvsálit, sorg, angist og onnur viðkomandi evni. Eisini verður arbeitt við at búfólkini lýsa og útgreina sína lívssøgu og fylgjur av henni, at tey greiða frá  relatiónum við onnur, og at tey seta upp hárisiko fyri at fella aftur í tað gamla mynstrið. Út frá tí verða samhoyrandi strategiir lagdar.

## Kjarnuøkið Eftirviðgerð

Eftirviðgerðin er eitt tilboð til viðskiftafólkini, ið hava verið í antin døgn- ella dagviðgerð. Við viðurkenning av at tað tekur sína tíð at gera eina broyting, ið skal vara restina av lívinum, bjóða vit eina eftirviðgerð.

Eftirviðgerðin er skipað sum eitt framhald av viðgerðini, og varar frá 6 mánaðum upp til 2 ár. Luttakararnir arbeiða við sínum relasjónum, og við hárisiko fyri at fella aftur til tað gamla mynstrið, og við strategium, ið eru samhoyrandi við hárisikoini, fyri at umgangast at ein fellur aftur. Bæði relasjónir, hárisiko og strategiir, eru arbeidd ígjøgnum áðrenn útskriving.

## Kjarnuøkið Avvarðandi

Familjuskeið er eitt tilboð til viðskiftafólk, ið eru avvarðandi til fólk við trupulleikum av rúsandi evnum. Vit, á Blákrossheiminum, viðurkenna týdningin av familjuni og tí sosiala netverkinum hjá viðskiftafólki okkara. Vit viðurkenna hvussu avgerandi tað er at taka hond um tørvin hjá børnum, ið liva í familjum, har foreldrini hava trupulleikar av rúsandi evnum. Vit viðurkenna, at "við-bundni" ikki bert oyðileggur lívið hjá hinum í familjuni, men eisini minkar um møguleikan hjá tí persóninum, ið er vorðin bundin av rúsandi evnum, til at gerast rúsfríur.

## Virksemistøl

Árliga gera vit hagtøl fyri arbeiði, niðanfyri eru tølini fyri 2009 og 2010, tøl fyri 2011 koma seinast í apríl mánaði, tá ársfrágreiðingin fyri 2011 kemur. Vit hava ætlan um at halda áfram við nakað sama tilboð av viðgerðum. Væntandi verður býtið líknandi sum undanfarin ár.

| **Heiti** | **2009** | **2010** |
|---|---|---|
| Tal av viðgerðum: | 175 | 198 |
| Tal av ambulantum í viðgerð: | 19 | 44 |
| Røktardagar í alt: | 4742 | 4675 |
| Røktardagar miðal | 27 | 23,6 |
| Miðal búfólk pr. dag: | 14,4 | 14,1 |
| Ymisk fólk í viðgerð: | 126 | 143 |
| Nýggj folk í viðgerð | 59 | 72 |
| Menn: | 82% | 75% |
| Kvinnur: | 18% | 25% |
| Miðalaldur: | 43 ár | 43 ár |
| Luttakarar á skeiði fyri avvarðandi | 29 | 12 |

**Innl. á Blákrossheiminum - býtt eftir viðgerð**

| Ár | Alkohol | Alkohol/tabl | Alkohol/tabl/hash | Alko/tabl/hash/narkotisk evni |
|---|---|---|---|---|
| 2009 | 106 | 12 | 32 | 27 |
| 2010 | 106 | 46 | 28 | 18 |

# 5. Mál og tiltøk fyri 2012

| **Endamál** | **Støða** | **Mál í 2012** | **Tiltøk/Avrik** |
|---|---|---|---|
| At fíggjarætlanin verður løgd við ársbyrjan, so | | At játtanin heldur | fylgja væl við, og tillaga virksemið. |

| | | | |
|---|---|---|---|
| játtanin heldur alt árið. | | | |
| Menna skráseting av bókhaldsskjølum | eru undir tilgongd | at skráseta øll bókhaldsskjøl í FSL | |
| Roknskaparreglugerð<br><br>Dagføra roknskaparreglugerð fyri Blákrossheimið, sum Heilsumálaráðið skal góðkenna | Uppskot til roknskaparreglugerð er gjørt í 2004 | At Blákrossheimið hevur eina dagførda roknskaparreglugerð, sum er týðulig, og greitt lýsir øll viðurskifti um roknskaparhaldið hjá Blákrossheiminum | Miðjað verður eftir, at roknskaparregluger ðin verður liðug og góðkend í septembur 2012. |
| Kjarnuøki<br><br>Viðgerð<br><br>Eftirviðgerð<br><br>Familjuskeið<br><br>Eftirmeting | <br><br>Er í eini dynamiskari tilgongd<br><br>Er sett í verk<br><br>Er undir endurskoðan og vit eru í ferð við at gjøgnumganga hvussu vit kunnu gera eina lýsingarherferð<br><br>Ikki byrjað | <br><br>Tann dynamiska tilgongdin heldur fram<br><br>At lýsa og greina eftirviðgerðina<br><br>At menna, lýsa og greina familjuskeiði og at hava fleiri familjuskeið.<br><br>Skjøl og onnur dokumentatión, ið skal nýtast skulu gerast | <br><br>Verður liðugt í september 2012<br><br>Verður liðugt í oktober 2012<br><br>Verður liðugt í septembur 2012 |
| At vera við at menna eitt tilboð, at fáa ein rúsfrían vin | Ikki byrjað | Neyðugar fyrireikingar verða framdar | Byrja verður í november 2012 |

Nevndin fyri Blákrossheimið hevur viðgjørt hendan sáttmálan og góðkent á fundi tann 13/2 – 2012.

Sáttmálin er undirskrivaður, Tórshavn, tann / -2012

Blákrossheimið

____________________________

Olga Magnussen, leiðari

Heilsumálaráðið

____________________________

Poul Geert Hansen, aðalstjóri